**Frágreiðing til Fiskivinnugransking um lidna menningarverkætlan**

# Nýggjan marknað fyri føroyska hýsu í Stórabretlandi

| **Heiti á verkætlanini:**<br>Nýggjan marknað fyri føroyska hýsu í Stórabretlandi | **Byrjan og endi:**<br>1. januar 2021-31. desember 2022 |
|---|---|
| **Skrivað hevur:**<br>Navn á verkætlanarleiðara: Jógvan Hansen, stjóri<br>Stovnur ella virki: JFK Trol, t-postur: jogvan@jfk.fo | |

| **Endamálið við verkætlanini:** |
|---|
| Í tráð við raðfestu økini í programminum fyri fiskivinnuroyndir er ætlanin við hesi verkætlan at "fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir" og at "fáa góðskuváttanir í øllum liðum". Harumframt vil verkætlanin stimbra undir *burðardyggan fiskiskap* eftir hýsu, tá nýggi marknaðurin hevur sum fortreyt, at føroyski hýsufiskiskapurin fær og varðveitir MSC-góðkenning. |

**Samandráttur av úrslitum**

1. Kanning av retailmarknaðinum í Stórabretlandi fyri at eyðmerkja viðkomandi kundabólkar at málrættað marknaðarføringina til.
   - Avtala er gjørd við navngivnan fiskakeypara um strategiskt samstarv um sølu- og marknaðarføringsátøk fyri føroyska hýsu mótvegis bretska retailbrúkaranum.
   - Kanningar vísa, at nýtslumynstrið hjá bretska brúkaranum er broytt seinnu árini, har brúkarin í nógv størri mun keypir online frá handlum og take-away frá matstøðum.
   - Eisini vísa kanningarnar ein vaksandi dent á burðardygd, heili 87% av bretsku fiskakeyparunum leggja serliga stóran dent á burðardygd, men saknaðu kunning.
   - Hagtølini fyri landingar av hýsu í Stórabretlandi og útflutning av norskari hýsu til Stórabretland vísa, at har er ein stórur vakstarmøguleiki fyri føroyskari hýsu.
2. Marknaðarføringskonsept er ment saman við altjóða samskiftisfyritøku.
3. Marknaðarføringsátøk eru roynd á messum og beinleiðis kundavitjanum. Vit kunnu t.d. nevna, at tá tað árliga Fish and Chips Avard var á várið 2023 – har ein velur tær bestu Fish and Chips matstovurnar - var filmurin um hýsuna vístur á fyrsta sinni. Hesin var sera væl mótikin, og omanfyri 300 fólk reistust úr stólinum og fagnaði filminum.

Leinkja til filmin liggur á heimasíðuni: jfk.fo undir titlinum *Faroese Haddock is back*

**Tíðarætlanin**

| | 2021 | | | | 2022 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Virksemi | 1kv | 2kv | 3kv | 4kv | 1kv | 1kv | 3kv | 4kv |
| Marknaðarkanning | ■ | ■ | | | | | | |
| Menning av konsepti | | ■ | ■ | | | | | |
| Marknaðarførings-átøk | | | ■ | ■ | ■ | ■ | | |

## INNLEIÐING

Tá JFK samtakið byrjaði at reka Kósina síðst í farnu øld var høvuðsframleiðslan á flakavirkinum frystir úrdráttir úr hýsu til bretska marknaðin fyrst og fremst Mark & Spencer. Longu fyrst í hesi øldini setti Marks & Spencer krav um burðardygga veiðu av fiskavørunum, ið tey keyptu úr Føroyum. Og tá føroyski hýsufiskiskapurin ikki hevði nakra góðkenning, mistu føroysku fiskaframleiðararnir og harvið eisini føroysku fiskiskipini ein týðandi marknað. Síðani tá eru úrdráttirnir úr føroysku hýsuni at kalla bara útfluttir feskt.

Nú Covid-19 hevur herjað, hava føroysku fiskaframleiðararnir verið skerdir í møguleikunum fyri at selja fiskavørur til catering, sum annars hevur verið ein sera týðandi keyparaskari.

Tá søkt bleiv um stuðul frá Fiskivinnugransking til hesa verkætlan í desember 2020, bleiv væntað, at MSC góðkennir føroyska hýsufiskiskapin árið eftir í 2021. Hóast bretski retailmarknaðurin óiva hevur flutt seg nógv, síðani føroyska fiskivinnan síðst seldi til hendan marknaðin, hevur Kósin longu sum er eina BRC-góðkenning, sum er ein matvørustandardur ásettur av bretskum retailarum.

Tí hevur føroyska fiskivinnan eitt gylt høvi til at loysa ein átroðkandi trupulleika – manglandi avtakarar í catering – við at gagnnýta komandi MSC-góðkenningina til fulnar og fáa selt føroysku hýsuna beinleiðis til bretskar handilsketur, soleiðis at føroysk fiskivinna flytur seg 'up stream' tættari at retailkundanum í Stórabretlandi. Samstundis vil hetta vera ein 'win-win' støða fyri føroyska fiskavinnu og samfelagið sum heild, tá ein samfelagsgagnlig menning við meira burðardyggum fiskiskapi verður stimbra fíggjarliga.

Ætlanin við hesi verkætlan er at "fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir" og at "fáa góðskuváttanir í øllum liðum". Harumframt vil verkætlanin stimbra undir *burðardyggan fiskiskap* eftir hýsu, tá nýggi marknaðurin hevur sum fortreyt, at føroyski hýsufiskiskapurin fær og varðveitir MSC-góðkenning.

Endamálið verður nátt við marknaðarbúskaparligum greiningum, sum skulu stuðla undir vinnuligum avgerðum um at bøta um marknaðaratgongdina í Stórabretlandi og betra um marknaðarføringina til hendan so týðandi marknað. Hetta er eisini í tráð við programmið fyri fiskivinnuroyndir.

Heilt ítøkiliga er ætlanin at fáa í lag eitt samstarv við dugnaligar samstarvsfelagar innan marknaðarføring, sum í samstarvi við Kósina, reiðarí og ráðgevarar tess vilja greina møguleikar, menna marknaðarføringskonsetp og seta í verk marknaðarføringina. Ein fyrimynd er átøkini hjá Visit Faroe Islands, sum við lítlum búsketti í samstarvi við ávísar lýsingarstovur og PR-serfrøðingar hevur rokkið fleiri hundrað milliónum hyggjarum upp á stutta tíð.

Hendan frágreiðing tekur saman um verkætlanina, úrslitini og vandamálini, ið eru komin undan kavi í verkætlanini. Serliga má staðfestast, at hugburðurin hjá føroyskum myndugleikum til springaradráp er størsta einstaka forðingin fyri, at føroysk hýsuframleiðsla av álvara kann fáa atgongd til marknaðin í Stórabretlandi.




## Marknaðarkanning: Marknaðurin er har og er svangur

Sum tað fyrsta høvdu umboð fyri Kósina/JFK Trol fund við umboð fyri Young's, ið er størsti og mest týðandi keyparin av fiskavørum á bretska marknaðinum. Young's settu í verk stórsligna marknaðarføringskampanju frá januar 2020, har tey branda seg mótvegis sínum 33 milliónum viðskiftafólkum sum "the UK's largest seafood specialist's 200 years of expertise to inspire people to cook and enjoy fish more often". Hetta sigur nakað um tørvin og møguleikarnar á marknaðinum, og um virðið í at fáa í lag samstarv við Young's. Young's vóru í fyrstu atløgu sera áhugaði í einum møguligum samstarvi, har leiðslan á Kósini fekk í lag fund við leiðandi persónar innan fiskavøruinnkeyp hjá Young's.




**Norskir fiskavøruútflytarar eru í gongd**

Ein annar bretskur fiskakeypari Asda hevur nýliga – í oktober 2021 – gjørt eitt strategiskt samstarv við norskar fiskavøruútflytarar umvegis Norwegian Seafood Council um felags marknaðarføring av burðardygt veiddum hvítfiski, herundir hýsu úr norskum sjógvi. "Seafood from Norway" brandið vil framyvir síggjast á "private label" fiskavørunum hjá Asda

við norskum toska- og hýsuúrdráttum. Hetta norska átakið er gjørt í kjalarvørrinum av umfatandi marknaðarkanningum, sum vísa, at 87% av viðskiftafólkunum raðfesta burðardygd hægst. Átakið kom í forleingilsi av líknandi átaki, sum Norwegian Seafood Council í september 2020 setti í verk saman við Asda og Waitrose í Stórabretlandi.

Sí meira her:

Norwegian Seafood Council launches retail tie-ups with Asda and Waitrose | News | The Grocer

Norwegian Seafood Council and Asda link for white fish sustainability push | News | The Grocer

Í fjórða ársfjórðingi 2022 helt marknaðarføringsátakið hjá Norwegian Seafood Council fram, nú eisini við Marks & Spencer um partnara í Stórabretlandi umframt Asda. Endamálið er sjálvandi at økja søluna av vørum úr norskum hvítfiski, men miðilin er at geva bretsku kundunum meira kunning um burðardygd á hvítfiskinum við norskum uppruna. Marknaðarkanningin hjá NSC vísti, at síðstu tvey árini eru bretskir kundar farin at eta munandi meira av fiski heima í mun til á matstovum/catering. Eisini vísa kanningar teirra, at bert 24% av bretsku viðskiftafólkunum vistu, hvussu tey kunnu síggja, um fiskurin tey keypa í fish & chip shoppum er burðardygt veiddur, og 53% vóru í iva, hvørt tey dugdu á at skyna munin millum tosk og hýsu. Áleið 74% av teimum spurdu hildu, at tey høvdu havt gagn av, at fish & chip shoppurnar upplýstu um burðardygdina á fiskaúrdráttunum.

Sum tað framgongur av hagtølunum frá Sjømat Norge yvir norska hýsuútflutningin í jan-nov í 2021 og 2022 eru útfluttu mongdirnar til Stórabretland minkaðar nakað í 2022 í mun til árið fyri. Fyri frystu hýsuna er talan um minking á 16% til sløk 10.000 tons fyrstu 11 mðr, og fyri fesku hýsuna er minkingin 11% til 5.600 tons.

**Norsk eksport av fryst hyse**
**Mengde i tonn, verdi i 1000 NOK**

| | November 2022 urevidente tall | | | Januar - november 2022 ureviderte tall | | | Januar - november2021 reviderte tall | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Mengde | Verdi | Pris pr.kg | Mengde | Verdi | Pris pr.kg | Mengde | Verdi | Pris pr.kg |
| TOTALT | 1.650 | 60.330 | 36,57 | 38.273 | 1.387.399 | 36,25 | 39.220 | 1.089.740 | 27,79 |
| Kina | 307 | 11.050 | 35,96 | 15.576 | 545.370 | 35,01 | 18.074 | 443.997 | 24,57 |
| Storbritannia | 468 | 16.765 | 35,79 | 9.956 | 398.024 | 39,98 | 11.835 | 389.096 | 32,88 |
| U S A | 572 | 22.622 | 39,54 | 5.043 | 198.544 | 39,37 | 3.828 | 125.102 | 32,68 |
| EU27 | 108 | 3.213 | 29,75 | 1.993 | 56.481 | 28,34 | 3.255 | 74.164 | 22,79 |
| Thailand | . | . | . | 1.335 | 47.187 | 35,34 | 366 | 8.942 | 24,43 |
| Canada | 53 | 1.990 | 37,41 | 1.416 | 47.079 | 33,26 | 638 | 16.891 | 26,46 |
| Vietnam | 52 | 1.551 | 29,90 | 1.460 | 44.780 | 30,68 | 562 | 13.313 | 23,67 |
| Indonesia | 89 | 3.139 | 35,35 | 1.339 | 44.664 | 33,37 | 619 | 17.092 | 27,62 |
| Polen | 43 | 920 | 21,37 | 974 | 25.751 | 26,44 | 2.451 | 56.452 | 23,04 |
| Litauen | 11 | 323 | 28,99 | 318 | 8.788 | 27,64 | 338 | 4.942 | 14,60 |

**Norsk eksport av fersk hyse**
**Mengde i tonn, verdi i 1000 NOK**

| | November 2022 urevIderte tall | | | Januar - november 2022 urevIderte tall | | | Januar - november2021 reviderte tall | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Mengde | Verdi | Pris pr.kg | Mengde | Verdi | Pris pr.kg | Mengde | Verdi | Pris pr.kg |
| **TOTALT** | 1.199 | 28.144 | 23,46 | 16.141 | 351.514 | 21,78 | 15.824 | 284.900 | 18,00 |
| **EU27** | 1.070 | 24.560 | 22,95 | 10.506 | 217.522 | 20,71 | 9.498 | 157.142 | 16,54 |
| **Danmark** | 1.006 | 23.020 | 22,89 | 9.454 | 194.195 | 20,54 | 7.465 | 123.845 | 16,59 |
| **Storbritannia** | 129 | 3.584 | 27,68 | 5.635 | 133.978 | 23,78 | 6.326 | 127.757 | 20,20 |
| **Latvia** | 16 | 429 | 26,70 | 269 | 6.390 | 23,75 | 59 | 891 | 15,16 |
| **Frankrike** | 29 | 511 | 17,53 | 433 | 6.306 | 14,57 | 1.221 | 16.057 | 13,15 |
| **Sverige** | 5 | 166 | 33,24 | 156 | 5.492 | 35,13 | 201 | 6.242 | 31,12 |
| **Tyskland** | 12 | 389 | 31,36 | 85 | 2.740 | 32,41 | 133 | 3.279 | 24,63 |
| **Polen** | . | . | . | 85 | 1.771 | 20,73 | 401 | 6.406 | 15,96 |
| **Nederland** | 2 | 43 | 26,72 | 20 | 534 | 26,27 | 14 | 316 | 22,35 |
| **Belgia** | 0 | 3 | 26,27 | 3 | 93 | 28,45 | 3 | 83 | 24,75 |
| **India** | . | . | . | 0 | 14 | 65,28 | 0 | 1 | 21,02 |

*Kelda: Norsk Sjømat, desember 2022*

## Korona hevur flutt viðskiftafólkini online




Fleiri greiningar vísa, at viðskiftafólk sum heild eru farin at keypa munandi meira av gerandisvørum á netinum eftir koronufarsóttina. Keypsmynstrið er broytt varandi. Longu nú keypir áleið ein triðingur av brúkarunum upp á heimsplan á netinum, og væntast hetta at vaksa til 40% næstu árini. Summir marknaðir hava flutt seg skjótari enn aðrir. Kanning hjá McKinsey vísti, at á bretska marknaðinum høvdu yvir 40% av brúkarunum síðstu 3 mánaðirnar handlað online.

Eisini tá tað kemur til at keypa mat, velja fleiri og fleiri viðskiftafólk at keypa mat frá matstovum til veiting heima. Í Stórabretlandi var parturin heili 36% í oktober 2021, sambært kanning hjá McKinsey.

Verður hugt nærri eftir samlaðu fiskanøgdini landaði í bretskum havnum sæst, at nøgdirnar av hýsu hava verið støðugt minkandi seinnu árini. Sí grafin yvir gongdina frá hagfrøðiligari frágreiðing hjá bretsku stjórnini. Samlaða landingarnøgdin er fallin frá 35.000 tons til áleið 25.000 tons í 2021, her eru landingar hjá útlendskum fiskiskipum í bretskum havnum tald við.

**Figure 2.6: Landings of key demersal species specifically cod and haddock continued to decrease in 2021.**

*(Live Weight, 000 tonnes)*




*Kelda: Bretska stjórnin, desember 2022*
https://assets.publishing.service.gov.uk/government/uploads/system/uploads/attachment_data/file/1107359/UK_Sea_Fisheries_Statistics_2021.pdf

Landaðu nøgdirnar av hýsu í bretskum havnum og norski útflutningurin av hýsu er sostatt minkaður seinnu árini av ymsum orsøkum. So her er pláss á marknaðinum fyri øktum útflutningi av hýsu úr Føroyum til Stórabretlands.

Men royndirnar hjá norsku fiskavøruútflytarunum við strategiskum samstarvi við Asda, Waitrose og Marks & Spencer eru ikki eintýðugt uppmuntrandi fyri føroyskar hýsuútflytarar. Bæði tí at norska vinnan hevur nógv størri fíggjarligar vøddar at brúka, tá útflutningsavgjaldið fíggjar stóru árligu marknaðarátøkini, sum Sjømat Norge stendur fyri. Men eisini tí, at tað ikki letur til at hava viðført munandi vøkstur í útfluttu nøgdunum av hýsu úr Noregi til Stórabretlands, hóast stór og dýr átøk.

So føroyska fiskivinnan má hugsað alternativt. Snildari. Um tað skal eydnast.

## Menningin av marknaðarføringskonseptinum

Fari var síðani undir at menna eitt marknaðarføringskonsept, sum saman við eini PR-strategi skuldi tryggja, at boðskapurin røkkur út til valda málbólkin, t.e. serliga kundabólkarnar hjá Young's. Fyri at gera menningararbeiðið professionelt og við altjóða dygd valdi Kósin/JFK at seta seg í samband við Rune Hørslev frá donsku samskiftisfyritøkuni Mensch. Rune Hørslev kennir gott til føroysk viðurskifti, tá hann hevur ment fleiri av marknaðarføringskonseptunum hjá Visit Faroe Islands, sum av álvara hava sett føroyska ferðavinnu á heimskortið. Mensch/Hørslev hava vunnið óteljandi altjóða virðislønir fyri átøkini, ið hann hevur verið uppruni til.

Fundur bleiv hildin við Mensch í desember 2021, har greitt bleiv frá marknaðarkanningini og møguliga samstarvinum við Young's umframt tørvinum á at marknaðarføra júst MSC-góðkendu hýsuna mótvegis nýggjum marknaðum, eitt nú á fiskivinnumessum uttanlands.

Mensch kom síðani við einum uppleggi og kostnaðarætlan, sum var í samsvar við fíggjarætlanina, ið var viðfest umsóknina til Fiskivinnugransking.

“Haddock is back” marknaðarføringskonseptið bleiv síðani ment og framleitt í samstarvi við Mensch og Kovboy Film. Konseptið byggir á fakta um føroyska hýsuveiðu, har útlendsku keypararnir skulu kunnast um veiðuhagtølini, sum liggja til grund fyri MSC-góðkenningini. Eisini skulu aðrar dygdir við føroysku hýsuveiðuni takast fram.

## Úrslitini av verkætlanini

Eftir ætlan skulu úrslitini av verkætlanini verða sjónlig í marknaðinum og í almenna rúminum í Føroyum og gagna føroysku fiskivinnuni í breiðum høpi, men serliga í mun til menning av burðardyggum fiskiskapi (gagn av MSC-góðkenningum) og størri virðisøking skapt í Føroyum.

**Marknaðarføringskonsept er klárt**

Eitt marknaðarføringskonsept er ment til endamálið. Tann mest týðandi bretski fiskainnkeyparin Young’s hevur sýnt ítøkiligan áhuga í einum strategiskum samstarvi um marknaðarføringsátøk og sølu av føroyskari hýsu á bretska marknaðinum. Marknaðarføringin bleiv roynd á fiskivinnumessuni í Barcelona á várið 2022, har fiskakeyparar vóru áhugaðir í nýggja møguleikanum at keypa MSC-góðkenda hýsu úr Føroyum.

Men afturmeldingin frá Young’s er tó, at so leingi føroyingar framhaldandi drepa springarar og loyva stórum drápum, sum á heysti 2021 elvdi til sera nógva og umfatandi neiliga umrøðu, vil stóri bretski fiskakeyparin ikki fara undir strategiskt samstarv um sølu og marknaðarføring av hýsuni á bretska marknaðinum. So her er talan um eina týðandi fortreyt fyri at eydnast við verkætlanini, sum knappliga ikki var uppfylt.

Marknaðarføringstilfarið er tó gjørt við tí fyri eyga, at hagtølini kunnu dagførast so hvørt sum nýggj almenn tøl fyriliggja. Sjálvt lýsingarfilmurin kann ómakaleyst dagførast.

**Lívfrøðiligu fortreytirnar eru eisini í lagi**

Hýsuframleiðslan á føroysku fiskavirkjunum er í vøkstri, nú hýsuveiðan seinnu árini hevur verið vaksandi. Havstovan metir – grundað á feskar stovnsmetingar hjá ICES er – at føroyski hýsustovnurin er væl fyri.

> “ICES mælir til, at veiðan av hýsu í 2023 kann vera í mesta lagi 11.853 tons. Hetta er ein øking á 37% í mun til tilmælið fyri 2022. Føroyski hýsustovnurin var í tíðarskeiðnum frá 2008 til 2017 undir markinum, har serlig verjutiltøk eru neyðug. Hýsustovnurin kom upp um hetta mark í 2018 og hevur verið í vøkstri síðan. Nýggjastu framskrivingarnar geva tó ábendingar um, at hesin vøksturin ikki verður so stórur, sum áður hildið.”
>
> 29. november 2022, Hav.fo

Havstovan metir hýsuveiðuna í ár til at verða 7.727 tons. Sostatt kann hýsuveiðan í prinsippinum økjast við yvir 50% uttan at koma í stríð við tilmæli frá ICES. Men í praksis verður hetta trupult, tá ICES mælir til bann fyri toskaveiðu, tá toskastovnurin verður mettur at vera so illa fyri í løtuni. Havstovan mælir soleiðis til at fiskidagarnar fyri bólk 3-5 verða skerdir við 5% í 2023. Eisini mælir Havstovan til at seta í verk hjáveiðureglur og økisfriðingar fyri antin ávísan reiðskap ella ávísar skipabólkar. Eisini er ætlanin at fáa ICES at gera eina eftirmeting av umstingaræltlanini, har føroysku myndugleikarnir síðani tillaga umsitingarætlanina í mun til hetta.

Tí kann ikki væntast, at føroyska fiskivinnan av álvara kann økja veiðutrýstið eftir hýsuni, tá hýsan vanliga verður veidd í blandingsfiskiskapi við toskaveiðu.

Úrslitini verða væntandi í síðsta enda, at bretski retailkundin fær kunnleika og hug til at keypa fiskaúrdráttir úr føroysku hýsuni. Hetta fer ikki bert at gagna luttakandi fyritøkunum, men føroyskari

hýsuframleiðslu sum heild. Men hetta verður sum frálíður og er ikki nátt enn. Serliga vegna springaradráp og vandan fyri vánaligari umrøðu í bretska almenna rúminum.

Av tí sama er triðja og síðsti stigið í hesi verkætlan – at seta í verk marknaðarføringina og styrkja søluinnsatsin – bert í avmarkaðan mun sett í verk. Hetta er tó alt virksemi, sum Kósin sjálvt skuldi fíggja og brúka arbeiðsløn upp á.

**Young's sýndi stóran áhuga fyri føroysku hýsuni**

Á fundinum millum umboð fyri Kósina/JFK og Young's sýndi stóri bretski fiskainnflytarin stóran áhuga fyri at fara undir nøkur felags átøk til at gera bretsku viðskiftafólkini vart við, at føroyska hýsan nú aftur fekk MSC góðkenning sum burðardygt veidd. Tað var ein alneyðug fortreyt at fáa eina blástempling frá altjóða felagsskapi. Hetta var tíðliga á vári 2021.

Tí bleiv fyrst arbeitt víðari við at fáa hýsuna góðkenda av MSC sum burðardygt veidda. Hetta bleiv gjørt í regi av Faroe Islands Sustainable Fisheries, hvørs uppstartur Fiskivinnugranskingin eisini var við til at stuðla. Í september 2021 bleiv hýsuveiðan undir Føroyum góðkend sum burðardygg. Harvið var mest týðandi fortreytin upp á pláss.

Eftir tann fyrsta fundin helt søludeildin á Kósini samband við innkeyparan. Semja var um, at Kósin kundi levera 4-7 hýsuprodukt, sum var

- 3 støddir av hýsu nakkum og
- 4 støddir av hýsu portiónum.

Semja var eisini um prísáseting og avtalað var, at hava ein fund aftur við marknaðardeildina og onnur í leiðsluni á Youngs.

Farið var til Onglands á fund, men har varð einki prát um hýsu ella prísir – Einasta evnið á fundinum var springaradrápið í Skálafirði, og hvussu vit í Føroyum gera slíkt, uttan at nakað seriøst kom frá landstýrinum ella løgtinginum, um at steðga hesum framyvir.

Á fundinum vóru 3 persónar frá marknaðardeildini hjá Young's, og tey vildu einki hava við okkum ella Føroyar at gera, tí tey væntaðu eitt PR-nightmare, um tey gjørdi nakað saman við okkum.

Tá bleiv avgjørt frá Young's-leiðsluni, at vit steðga her, til ein seriøs avgerð var komin frá landsmynduleikum.

So seint sum í oktober 2023 á Groundfish Forum varð kannað, um møguleiki var at fáa fund við hesar keyparar, fyri at kanna um okkurt samstarv var møguligt.

Men støðan var enn verri, tí teir væntaðu, at teir einki samstarv kundu hava við okkum, fyrr enn forboð varð sett fyri at drepa springarar.

**Vit á Kósini blanda okkum ikki uppí, hvat politiski mynduleikin ger við springaradráp í framtíðini, men tað er ein sannroynd, at um vit skulu selja til fremstu supermarkedsketurnar í Onglandi, so verður ikki góðkent, at Føroyar drepa springarar framyvir.**

Klaksvík hin 22. desember 2023

Hanus Hansen
stjóri